UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið.

Tórshavn, tann 7. mars 2016
Vmr. J.Nr.: 15/00029

Viðgjørt: SPS/JD

Løgtingsmál nr. 91/2015: Uppskot til løgtingslóg um broyting í anordning om ikrafttræden for Færøerne af årsregnskabsloven (ársroknskaparlógin)
(Avsetan til tiltakspening fyri ikki fult inngoldnan yvirkurs í smápartafeløgum og til bundnan tiltakspening í íverksetarafeløgum, frágreiðing um samfelagsábyrgd)

Uppskot

til

Uppskot til løgtingslóg um broyting í anordning om ikrafttræden for Færøerne af årsregnskabsloven (ársroknskaparlógin)
(Avsetan til tiltakspening fyri ikki fult inngoldnan yvirkurs í smápartafeløgum og til bundnan tiltakspening í íverksetarafeløgum, frágreiðing um samfelagsábyrgd)

§ 1

Í anordning nr. 1355 frá 9. desember 2007 om ikrafttræden for Færøerne af årsregnskabsloven, sum broytt við **løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2009, løgtingslóg nr. 69 frá 27. mai 2011 og løgtingslóg nr. 136 frá 11. desember 2013, løgtingslóg nr. 50 frá 12. mai 2015 og løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008** verða gjørdar hesar broytingar:

1. Sum stytt heiti verður nýtt:

"(Ársroknskaparlógin)"

2. § 35 b, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Parta- og smápartafeløg, har tann teknaði virkiskapitalurin ikki er fult inngoldin í, skulu:

1) írokna ikki inngoldnan virkiskapital og ikki inngoldnan yvirkurs sum áogn, sbr. lýsing av ogn í fylgiskjali 1, C, nr. 1, sbr. stk. 2, ella
2) uttan mun til lýsingina av ogn í fylgiskjali 1, C, nr. 1 týðiliga undir ávikvist virkiskapitali og yvirkursi draga frá eina upphædd, ið svarar til ikki inngoldnan virkiskapital og møguligan yvirkurs, sbr. stk. 3."
.

3. Í § 35 b, stk. 2 og 3, verður eftir "virkiskapital" sett: "og yvirkurs" og eftir "virkiskapitalin" verður sett: "og yvirkursin".

4. Eftir § 35 b verður sett:

"§ 35 c. Eitt íverksetarafelag skal árliga seta av í minsta lagi 25 pst.

av yvirskotinum hjá fyritøkuni til bundnan tiltakspening til at byggja upp kapitalgrundarlag fyritøkunnar, til hesin tiltakspeningur saman við felagskapitalinum tilsamans er í minsta lagi kr. 50.000. Hesin tiltakspeningur kann ikki verða strikaður við vinnufelagsins undirskoti ella á annan hátt verða minkaður. Tiltakspeningurin skal tó strikast ella minkast í tann mun felagskapitalurin økist."

5. Aftan á § 99 verður sett:
"§ 99 a. Stórar fyritøkur skulu í leiðslufrágreiðingina skoyta upp í eina frágreiðing um samfelagsábyrgd, sbr. stk. 2-8. Við fyritøkunnar samfelagsábyrgd er at skilja, at fyritøkur sjálvboðið taka við sømdir fyri m.a. mannarættindum, sosialum viðurskiftum, umhvørvis- og veðurlagsviðurskiftum og harumframt stríðast móti mutri í teirra handilsmannagongdum og handilsvirksemi. Hevur fyritøkan ikki politikk fyri samfelagsábyrgd, skal tað verða upplýst í leiðslufrágreiðingini.
Stk. 2. Frágreiðingin skal innihalda upplýsing um:
1) Fyritøkunnar politikk viðvíkjandi samfelagsábyrgd, m.a. møgulig aðalkrøv, leiðreglur ella meginreglur fyri samfelagsábyrgd, sum fyritøkan nýtir.
2) Hvussu fyritøkan fremur í verki politikk sín viðvíkjandi samfelagsábyrgd, m.a. møguligar skipanir ella framferðarhættir um tað.
3) Tað fyritøkan metir er rokkið sum fylgja av fyritøkunnar arbeiði í sambandi við samfelagsábyrgd í roknskaparárinum, og harumframt møguligar vónir um arbeiðið í framtíðini.
Stk. 3. Um fyritøkan hevur politikk viðvíkjandi tí at virða mannarættindini og viðvíkjandi tí at minka um veðurlagsárinið í sambandi við virksemi fyritøkunnar, skal frágreiðingin sbrt. stk. 1 nágreiniliga innihalda upplýsingar um henda politikk. Um fyritøkan hevur slíkan politikk, skal stk. 2 samsvarandi nýtast. Hevur fyritøkan ikki slíkan politikk, skal tað verða upplýst í leiðslufrágreiðingini.
Stk. 4. Frágreiðingin skal latast í tilknýti til leiðslufrágreiðingina. Fyritøkan kann tó ístaðin avgera at lata frágreiðingina

1. í eini ískoytisfrágreiðing til ársfrásøgnina, sbr. § 14, sum víst verður til í leiðslufrágreiðingini, sbr. stk. 5, 1. pkt., ella
2. á heimasíðuni hjá fyritøkuni, sum víst verður til í leiðslufrágreiðingini, sbr. stk. 5, 2. pkt.

Stk. 5. Landsstýrismaðurin ásetur reglur um at almannakunngera frágreiðingina um samfelagsábyrgd í eini ískoytisfrágreiðing til ársfrásøgnina og um skyldur hjá grannskoðara í mun til tær upplýsingar, sum verða almannakunngjørdar í henni, sbr. stk. 4, nr. 1. Skráseting Føroya ásetur reglur um, hvussu frágreiðingin um samfelagsábyrgd skal almannakunngerast á heimasíðuni hjá fyritøkuni, m.a. reglur um fyritøkunnar dagføring av upplýsingunum á heimasíðuni og um skyldurnar hjá grannskoðara í sambandi við tær upplýsingar, sum verða almannakunngjørdar á heimasíðuni, sbr. stk. 4, nr. 2.
Stk. 6. Fyri fyritøkur, sum seta upp samtøkuroknskap, er tað nøktandi, at upplýsingarnar sambært stk. 1-3 verða givnar fyri samtøkuna sum heild.

Stk. 7. Ein dótturfyritøka, sum er partur av eini samtøku, kann lata vera við at taka upplýsingarnar við í sína egnu leiðslufrágreiðing, um 1) móðurfyritøkan lýkur upplýsingarkrøvini sambært stk. 1-3 fyri samtøkuna í síni heild ella 2) móðurfyritøkan hevur sett upp eina framburðarfrásøgn í sambandi við, at hon tekur undir við ST-viðtøkuni Global Compact ella Meginreglum ST fyri ábyrgdar íløgur.
Stk. 8. Ein fyritøka, sum hevur orðað eina framburðarfrásøgn í sambandi við, at hon tekur undir við Global Compact ST ella Meginreglur ST fyri ábyrgdar íløgur, kann lata vera við at veita tær upplýsingar, sum eru nevndar í stk. 1 og 2. Tað sama er galdandi fyri tær upplýsingar, sum skulu veitast sambært stk. 3, um framburðarfrásøgnin fevnir um mannarættindi og veðurlag. Fyritøkan skal upplýsa í leiðslufrágreiðingini, at hon nýtir hesa undantøku, og tilskila, hvar frásøgnin er alment atkomulig.

6. Í "Bilag 2, Skemaer for balancer og resultatopgørelser, 1. skema for balance i kontoform (regnskabsklasse B, C og D), AKTIVER, OMSÆTNINGSAKTIVER, II. Tilgodehavender, nr. 6", verður aftan á "Krav på indbetaling af virksomhedskapital" sett: "og yvirkurs".

7. Í "Bilag 2, Skemaer for balancer og resultatopgørelser, 1. skema for balance i kontoform (regnskabsklasse B, C og D), PASSIVER, EGENKAPITAL, IV. Andre reserver, nr. 4, verður aftaná "Tiltakspeningur fyri ikki inngoldnan virkiskapital" sett: "og yvirkurs".

8. Í "Bilag 2, Skemaer for balancer og resultatopgørelser, 1. skema for balance i kontoform (regnskabsklasse B, C og D), PASSIVER, EGENKAPITAL, IV. Andre reserver", verður eftir nr. 4 sum nýtt nummar sett: "5. Tiltakspeningur fyri íverksetarafeløg".

Nr. 5-7 verða eftir hetta nr. 6-8.

9. Í "Bilag 2, Skemaer for balancer og resultatopgørelser, 2. skema for balance i beretningsform (regnskabsklasse B, C og D), OMSÆTNINGSAKTIVER, II. Tilgodehavender, nr. 6", verður aftan á "Krav på indbetaling af virksomhedskapital" sett: "og yvirkurs".

10. Í "Bilag 2, Skemaer for balancer og resultatopgørelser, 2. skema for balance i beretningsform (regnskabsklasse B, C og D), EGENKAPITAL, IV. Andre reserver, nr. 4", verður aftan á "Tiltakspeningur fyri ikki inngoldnan virkiskapital" sett: "og yvirkurs".

11. Í "Bilag 2, Skemaer for balancer og resultatopgørelser, 2. skema for balance i beretningsform (regnskabsklasse B, C og D), EGENKAPITAL, IV. Andre reserver", verður aftan á nr. 4 sum nýtt nummar sett:
"Nr. 5. Tiltakspeningur fyri íverksetarafeløg".

Nr. 5-7 verða eftir hetta nr. 6-8.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2017.

UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Kapittul. 1. Almennar viðmerkingar

1. Bakstøðið og endamálið við lógaruppskotinum

Við hesum verður lagt fram uppskot til broytingar í ársroknskaparlógini.

Um bakstøðið og endamálið við lógaruppskotinum verður víst til almennu viðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 87/2015: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (vinnufelagalógin).

Uppskotið inniheldur fylgibroytingar til uppskotið til løgtingslóg um broyting í vinnufelagalógini. Tað snýr seg um:

- Avsetan til tiltøkupening fyri ikki fult inngoldnan yvirkurs í smápartafeløgum og til bundnan tiltøkupening í íverksetarafeløgum.
- Harumframt verður skotið upp, at tað í ársroknskaparlógini verður sett eitt nýtt upplýsingarkrav í § 99 a um frágreiðing um samfelagsábyrgd. Upplýsingarkravið hevur við sær, at fyritøkurnar, sum eru fevndar av ásetingini, skulu greiða frá sínum politikki og siðvenju fyri samfelagsábyrgd. Fyritøkan skal upplýsa, um hon ikki hevur ein politikk fyri samfelagsábyrgd.

2. Høvuðsinnihaldið í uppskotinum

2.1. Avsetan til tiltakspening fyri ikki fult inngoldnan yvirkurs í smápartafeløgum og til bundnan tiltakspening í íverksetarafeløgum

Galdandi reglur

Við vinnufelagalógini varð tað møguligt at inngjalda felagskapitalin partvíst, tó í minsta lagi 25 pst. av felagskapitalinum, og í minsta lagi 80.000 kr. Ein møguligur yvirkursur skal tó rindast fult inn.

Sum avleiðing av ásetingini í vinnufelagalógini varð ársroknskaparlógin broytt soleiðis, at kapitalfeløg, sum hava nýtt møguleikan til partvísa inngjalding av felagskapitalinum, kunnu velja annað hvørt at innrokna ikki inngoldnan felagskapital sum eina bruttosparing í javnanum ella sum eina nettopostering undir eginpeninginum. Ásetingin avmarkar møguleikarnar at rinda útbýti o.a., so leingi kapitalurin við yvirkursi afturat ikki er fult inngoldin.

Uppskotið

Eftir uppskotinum um at broyta § 33 í vinnufelagalógini verður gjørligt fyri smápartafeløg at rinda møguligan yvirkurs partvíst inn til felagskapitalin.

Sum avleiðing av hesum verður skotið upp, at ásetingin í ársoknskaparlógini um ikki inngoldnan fyritøkukapital í § 35 b og roknskapartalva fyri javna verða broytt samsvarandi. Ásetingin

avmarkar møguleikan at rinda útbýti o. a., so leingi felagskapitalurin við yvirkursi afturat ikki er fult inngoldin.

Skotið verður harumframt upp at innseta ásetingar í vinnufelagalógina um eitt nýtt slag av vinnufeløgum, nevnd íverksetarafeløg. Eitt íverksetarafelag er eitt serligt slag av smápartafelagi, tó við serreglum viðvíkjandi felagsins kapitalviðurskiftum. Eftir uppskotinum er bert krav, at eitt íverksetarafelag hevur ein felagskapital upp á 1 kr. við stovnan, og at tað áliggur felagnum at seta av 25 pst. av yvirskotinum til bundnan tiltakspening til at byggja upp felagsins kapitagrundarlag.

Skotið verður tí upp, at tað verður sett ein áseting um hetta í ársroknskaparlógina, og at roknskapartalvurnar fyri javnan verða broyttar samsvarandi. Ásetingin avmarkar møguleikan at rinda útbýti o. a., so leingi íverksetarafelagið ikki hevur ein felagskapital, sum samsvarar við fult inngoldnan kapital í einum smápartafelag

2.2. Krav um frágreiðing um samfelagsábyrgd
Lógaruppskotið hevur til endamáls at eggja teimum størstu føroysku fyritøkunum, fyritøkum, sum eru skrásettar á einum keypsskála, og landspartafeløgum, sum eru fevnd av ársroknskaparlógini, at hava ein virknan leiklut í mun til, hvussu tær kunnu vera við til at loysa samfelagsligar avbjóðingar.

Stór feløg eru feløg, sum fara upp um tvey av hesum trimum mørkum : Ein javna upp á 143 mió. kr, ein nettoumsetning upp á 286 mió. kr., og í miðal 250 fulltíðarstarvsfólk ella fleiri.

Samfelagsábyrgd í hesum høpi merkir, at fyritøkan sjálvboðin integrerar m.a. mannarættindi, sosial viðurskifti, umhvørvis- og veðurlagsviðurskifti, umframt basan av mutri í sínum handilsmannagongdum og handilsvirksemi, t.e. uttan at fyritøkan, sambært lóggávuni í landinum, har hon virkar, hevur skyldu til tess.

Skotið verður tí upp, at hesar fyritøkur verða bundnar til, sum part av teirra roknskaparfrágreiðslu, at greiða frá síni støðu viðvíkjandi samfelagsábyrgd.

Við lógaruppskotinum verður einans ásett krav um, at fyritøkurnar, ið eru fevndar av uppskotinum, skulu upplýsa um sín politikk um samfelagsábyrgd, hvussu fyritøkan setur hendan politikk í verk, og hvat úrslitið í roknskaparárinum er av arbeiðinum við samfelagsábyrgd, umframt upplýsa um møguligar væntanir til arbeiðið frameftir. Um fyritøkan ikki hevur slíkan politikk, skal fyritøkan upplýsa hetta.

Lógaruppskotið broytir ikki, at samfelagsábyrgdin hjá fyritøkuni er sjálvboðin. Fyritøkan velur sjálv, um – og hvussu – hon ynskir at integrera omanfyrinevndu atlit í sínum handilsmannagongdum og handilsvirksemi. Upplýsingarkravið áleggur sostatt ikki umfataðu fyritøkunum at hava ein politikk um samfelagsábyrgd, eins og krøv ikki verða sett um, hvussu einstaka fyritøkan arbeiðir við samfelagsábyrgd.

Arbeiðið hjá føroyskum fyritøkum við samfelagsábyrgd eigur at taka støði í einum altjóða viðurkendum fatanarstøði. Tað er tí ein fyrimunur, um fyritøkur og íleggjarar taka støði í ST-meginreglunum um samfelagsábyrgd. Tað snýr seg um ST Global Compact og ST-meginreglurnar um ábyrgdarfullar íløgur (UN PRI).

Hetta kemst av, at uppskotið um innihaldið í frágreiðingini um samfelagsábyrgd, sum gongur fram av § 99 a, stk. 1-3, í uppskotinum, fylgir ST- tilmælunum um innihaldið í framburðarfrásagnum, sum limir av ST Global Compact skulu gera.

Global Conpact (www.unglobalcompact.org) er heimisns stórsta sjálvbodna netverk fyri fyritøkur, sum arbeiða við samfelagsábyrgd.

Sama upplýsingarkrav, sum í hesum uppskotinum, verður sett institutionellum íleggjarum, íleggingarfeløgum og fíggjarfyritøkum annars (bankar og tryggingarfeløg), sum eru skrásett á einum keypsskála, ið ikki eru fevnd av ársroknskaparlógini. Roknskaparreglurnar fyri hesar fyritøkur eru í stóran mun ásettar í kunngerðum, givnar av Fíggjareftirlitinum. Upplýsingarskyldan viðvíkjandi samfelagsábyrgd verður tí – fyri hesar fyritøkur – ásettar av Fíggjareftirlitinum. Hetta kann gerast við støði í verandi heimildum at áseta roknskaparreglur fyri hesar fyritøkur.

Altjóðagerðin merkir, at fíggjarligu, mentanarligu og politisku sambondini tvørtur um landamørk gerast upp aftur tættari. Altjóðagerðin hevur við sær øktan samhandil og økt altjóða arbeiðsbýti í t.d. vøruframleiðsluni. Á henda hátt gerast sjónligari fleiri avbjóðingar í mun til t.d. sosial kor, arbeiðsviðurskifti, umhvørvi og veðurlag, sum krevja eitt virkið samstarv landanna millum og millum ymsar aktørar í samfelagnum.

Í eini støðu við alsamt harðari altjóða kapping og globalum sosialum og umhvørvisligum avbjóðingum, umframt alt meira opnir streymar av informatión, mugu fyritøkur og íleggjarar á virknan hátt taka støðu til altjóða dagsskránna. Hetta kann t.d. gerast sum eitt krav til ein útlendskan veitara um at halda grundleggjandi umhvørviskrøv ella arbeiðstakara- og mannarættindi.

Uppskotið hevur til endamáls at eggja fyritøkum og íleggjarum til at hava ein virknan leiklut í mun til samfelagsábyrgd. Við handilsriknari samfelagsábyrgd kunnu fyritøkurnar vera við til at loysa samfelagsligar avbjóðingar og samstundis skapa betri handilsmøguleikar fyri seg sjálvar. Handilsrikin samfelagsábyrgd merkir, at samfelagsábyrgdin hjá fyritøkunum skal setast saman við kjarnuvirkseminum hjá fyritøkuni.

Føroyar fara at standa sterkari í altjóða høpi so hvørt, sum fleiri fyritøkur og íleggjarar taka eina virkna støðu til samfelagsábyrgdina og kunna almenningin um hetta. Hetta kann vera við til at gera føroyskar fyritøkur og Føroyar kendar fyri ábyrgdarfullan vøkstur. Tað verður á tann hátt lættari hjá føroyskum fyritøkum at gera mun á sær og kappingarneytum á altjóða marknaðum, um føroyskar vørur og veitingar í útgangsstøði verða fataðar sum ábyrdarfullar og burðardyggar. Ætlaða upplýsingarkravið fer at skapa størri opinleika og á tann hátt styrkja møguleikan hjá viðskiftafólki, lokalsamfelag, íleggjarum, starvsfólkum og fjølmiðlum at taka støðu til, hvussu fyritøkurnar og íleggjararnir arbeiða við samfelagsábyrgd.

Ætlaða upplýsingarkravið broytir ikki, at tað eisini fram eftir fer at vera upp til ta einstøku fyritøkuna og tann einstaka íleggjaran at velja, um og hvussu arbeiðast skal við samfelagsábyrgd. Somuleiðis er tað framhaldandi avgerðin hjá hvørji fyritøku sær, hvussu tær ítøkiliga velja at taka við hesum avbjóðingunum, og hvørjar ítøkiligar upplýsingar á bestan hátt lýsa, hvussu fyritøkan arbeiðir við samfelagsábyrgd.

Fleiri lond, herundir Danmark og Noreg, hava sett í gildi lóggávu, sum skal eggja fyritøkum og íleggjarum at arbeiða meira virkið við samfelagsábyrgd.

3. Ummæli

Uppskotið hevur saman við uppskotinum til løgtingslóg um broyting í vinnufelagalógini og uppskotinum til løgtingslóg um broyting í vinnufyritøkulógni verið til hoyringar.

Ummæli er innkomið frá Fíggjarmálaráðnum, Taks, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Handverksmeistarafelag og Reiðarafelagnum fyri Farmaskip undir einum og Felagnum Føroyskir Grannnkoðarar, sum hava gørt viðmerkingar til uppskotini undir einum.

Víst verður til almennu viðmerkingarnar, kapittul I, pkt. 3, í løgtingsmál nr. 87 /2015: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (vinnufelagalógin)

Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum

1. Fíggjarligar avleiðingar

A. Fyri landið

Uppskotið hevur ikki við sær fíggjarligar avleiðingar fyri landið.

B. Fyri kommunurnar

Uppskotið hevur ikki fíggjarligar útreiðslur við sær fyri kommunurnar.

C. Fyri vinnuna

Uppskotið hevur ikki fíggjarligar útreiðslur við sær fyri vinnuna.

2. Umsitingarligar avleiðingar

Uppskotið verður mett at hava minni umsitingarligar avleiðingar við sær fyri landið. Skráseting Føroya hevur eftirlit við ársroknskapum. Hetta eftirlit verður víðkað til eisini at fevna um nýggju krøvini, sum verða skotin upp í ársroknskaparlógini.

Mett verður, at uppskotið hevur ávísar umstingarligar avleiðingar fyri stórar fyritøkur í sambandi við frágreiðing í ársfrásøgn um status viðvíkjandi undirumboðaða kyninum í leiðsluni, og í sambandi við frágreiðing í ársfrásøgn um samfelagsábyrgd.

3. Umhvørvisavleiðingar

Uppskotið hevur ikki við sær umhvørvisavleiðingar.

4. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri øki í landinum.

5. Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur

Uppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur.

6. Sosialar avleiðingar

Uppskotið hevur ikki við sær sosialar avleiðingar.

Talva 1: Yvirlit yvir avleiðingar

	Fyri landskassan/ landsstýrið	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss/øki í landinum	Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar	Nei	nei	nei	nei	nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	nei	nei	nei	ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	nei	nei	nei	nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	nei	nei	nei	nei
Sosialar avleiðingar				nei	

Kap. 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1:

Til nr. 1
Heitið á lógin, sum vanliga verður nýtt, er „ársroknskaparlógin“.

Til nr. 2

Ársroknskaparlógarinnar § 35 b, stk. 1, snýr seg um ikki fult inngoldnan virkiskapital.

Broytingin av § 35 b – umframt broytingin av “Bilag 2, skema 1 og 2 ársroknskaparlógini - er ein avleiðing av, at tað verður skotið upp at broyta vinnufelagalógarinnar § 33 soleiðis, at tað ikki longur skal vera eitt krav, at allur yvirskursurin skal inngjaldast beinanvegin, tá nýggir kapitalpartar verða teknaðir í einum smápartafelag.

Mett verður hóskandi, at tað skal vera ein tiltøkupeningur, sum svarar til ikki inngoldna yvirskursin. Við tí verður tryggjað, at yvirkursurin ikki kann nýtast til útbýti e.l., áðrenn hann er inngoldin. Hetta samsvarar við tann verandi tiltøkupeningin fyri ikki inngoldnan virkiskapital.

Til nr. 3
Ársroknskaparlógarinnar § 35 b, stk. 2 og 3 snúgva seg ávikavist um brutto- og nettonpresentatión í sambandi við ikki inngoldnan virkiskapital.

Broytingin av § 35 b, stk. 2 og 3 er ein avleiðing av, at tað verður skotið upp at broyta vinnufelagalógarinnar § 33 soleiðis, at tað ikki longur skal vera eitt krav, at allur yvirskursurin skal inngjaldast beinanvegin, tá nýggir kapitalpartar verða teknaðir í einum smápartafelag.

Skotið verður upp, at § 35 b, stk. 2 og 3 verða broytt samsvarandi hesum.

Til nr. 4

Talan er um seta nýggja áseting í lógina sum § 35 c.

Ásetingin er ein avleiðing av, at tað í løgtingsmál nr. 87/2015: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (vinnufelagalógin) verður skotið upp eitt serligt slag av smápartafeløgum, "íverksetarafelag". Endamálið við ásetingini er at tryggja, at tað í íverksetarafeløgum verður avsettur ein partur av ársúrslitinum til ein serligan tiltøkupening, til felagkapitalurin og tann serliga bundni tiltakspeningurin er upp á í minsta lagi 50.000 kr.

Ásetingin samsvarar við ta áseting í § 309 b, sum er skotin upp at seta í vinnufelagalógina, sbr. § 1, nr. 173 í løgtingsmáli nr. 87/2015: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (vinnufelagalógin).

Tiltøkupeningurin kann ikki nýtast til útbýti ella minkast við undirskoti. Tiltøkupeningurin kann sostatt einans verða fluttur til felagskapital ella minkast í tann mun, tey, sum eiga fyritøkuna, hækka fyritøkukapitalin, t.d. við nýggjum innskoti.

Til nr. 5

§ 99 a

Skotið verður upp, at tað í ársroknskaparlógini verður sett eitt nýtt upplýsingarkrav í § 99 a um frágreiðing um samfelagsábyrgd. Upplýsingarkravið hevur við sær, at fyritøkurnar, sum eru fevndar av ásetingini, skulu greiða frá sínum politikki og siðvenju fyri samfelagsábyrgd. Fyritøkan skal upplýsa, um hon ikki hevur ein politikk fyri samfelagsábyrgd.

Kravið um samfelagsábyrgd hevur ikki bakstøði í ES-direktivum, men onnur lond, eitt nú Noreg, hevur samsvarandi ásetingar í norsku "regnskapsloven".

Eftir § 99 a, stk. 1, 1. pkt. eru stórar fyritøkur í roknskaparflokki C fevndar av kravinum. Sipað verður til fyritøkur, sum tvey ár á rað fara upp um tvey av trimum støddarmørkum fyri miðalstórar fyritøkur. Hetta merkir ein javna upp á 143 mió. kr., ein nettoumsetning upp á 286 mió. kr. og eitt miðaltal av fulltíðarstarvsfólkum í einum roknskaparári upp á 250, sbr. § 7, stk. 2, nr. 2 og 3 í ársroknskaparlógini.

Kravið fevnir eisini um fyritøkur í roknskaparflokki D. Hetta eru fyritøkur, sum hava virðisbrøv, upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði í einum ES/EØS-landi, og landspartafeløg, sbr. § 7, stk. 1, nr. 4, og § 102 í ársroknskaparlógini. § 102 ásetur, hvørjar reglur í ársroknskaparlógini galda fyri fyritøkur, sum eru fevndar av roknskaparflokki D.

Fyri fyritøkur, sum eru partur av einum samtaki, verða skotnir upp nakrir lættar í § 99 a, stk. 5 og 6. Lættarnir kunnu brúkast av bæði stórum fyritøkum í roknskaparflokki C og fyritøkum í roknskaparflokki D.

Ásetingarnar um frágreiðing um samfelagsábyrgd galda harumframt fyri samtaksroknskapin, sbr. tilvísingina í § 128, stk. 2. Nevnda áseting nevnir tær reglur um

leiðslufrágreiðingina, sum verða at nýta samsvarandi fyri leiðslufrágreiðingina hjá samtakinum.

Samfelagsábyrgdin hjá fyritøkum verður eftir § 99 a, stk. 1, 2. pkt. at skilja soleiðis, at fyritøkurnar sjálvbodnar integrera atlit at m.a. mannarættindum, sosialum viðurskiftum, umhvørvis- og veðurlagsviðurskiftum, umframt basan av mutri í handilsmannagongdum og handilsvirksemi. Tað er sostatt sjálvboðið fyri fyritøkurnar, um tær vilja arbeiða við samfelagsábyrgd á einum ella fleiri av omanfyrinevndu økjum, umframt tað, sum tær hava skyldu til eftir lógini.

Hevur fyritøkan ongan politikk fyri samfelagsábyrgd, skal hetta upplýsast, sbr. § 99 a, stk. 1, 3. pkt. í uppskotinum. Kravt verður ikki, at fyritøkan skal grundgeva fyri hesum.

Hevur fyritøkan ein politikk fyri samfelagsábyrgd, skal frágreiðingin innihalda tær upplýsingar, sum ganga fram av § 99 a, stk. 2, nr. 1-3, sum nevna yvirskipaðu krøvini til innihaldið í frágreiðingini um samfelagsábyrgd. Av teimum orsøkum, sum eru nevndar í kapittul 1, 2. pkt. í almennu viðmerkingunum, hevur uppskotið ikki neyv krøv til innihaldið í frágreiðingini.

Tá ið fyritøkan ger sína frágreiðing, kann fyritøkan eitt nú taka støði í ST-meginreglunum um samfelagsábyrgd í Global Compact. Víst verður til kapittul 1, 2. pkt. í almennu viðmerkingunum í almennu viðmerkingunum.

Sambært § 99 a, stk. 2, nr. 1 skal frágreiðingin innihalda eina umrøðu av politikki fyritøkunnar fyri samfelagsábyrgd, um fyritøkan hevur hendan. Politikkurin kann sum nevnt m.a. snúgva seg um átøk fyritøkunnar fyri at fremja mannarættindi og arbeiðstakararættindi, betra um umhvørvið, minka um árinið á veðurlagið og um at virka móti mutri.

Politikkur í hesum føri er – í víðum høpi – at skilja sum innanhýsis leiðreglur, málsetningar, strategiir ella onnur skjøl, sum lýsa, hvussu fyritøkan arbeiðir við samfelagsábyrgd.

Somuleiðis skal fyritøkan upplýsa um møgulig aðalkrøv, leiðreglur ella meginreglur fyri samfelagsábyrgd, sum fyritøkan nýtir.

Eftir § 99 a, stk. 2, nr. 2 skal fyritøkan greiða frá, hvussu hon fremur sín politikk í verki, heruppií eisini greiða frá møguligum skipanum og mannagongdum. Talan kann eitt nú vera um leiðsluskipanir, eftirlitsskipanir, eftirmetingar ella aðrar mannagongdir, sum á skipaðan hátt eftirkanna, hvussu politikkurin verður settur í verk. Frágreiðingin skal eisini upplýsa, um hon er góðkend sambært eini góðkenningarskipan fyri annaðhvørt mannagongdir ella vørur (merkingarskipanir).

At enda skal fyritøkan eftir § 99 a, stk. 2, nr. 3 meta um, hvat úrslitið í roknskaparárinum er av arbeiðinum við samfelagsábyrgd, umframt upplýsa um møguligar væntanir til arbeiðið frameftir. Kravt verður ikki, at fyritøkan skal meta um, hvørji fíggjarlig úrslit arbeiðið við samfelagsábyrgd hevur havt við sær.

Eftir § 99 a, stk. 3, 1. pkt. skal frágreiðingin um samfelagsábyrgd setast annaðhvørt í leiðslufrágreiðingina í ársfrásøgn fyritøkunnar ella í skjal til leiðslufrágreiðingina. Í 2. pkt. verða nevndir tveir aðrir møguleikar at almannakunngera frágreiðingina.

Um frágreiðingin verður latin í einum skjali, skal vísast til hetta skjal í leiðslufrágreiðingini, og tað skal í skjalinum vera púra greitt, at skjalið er partur av leiðslufrágreiðingini, sbr. § 2, stk. 1, nr. 2 í ársroknskaparlógini.

Er frágreiðingin um samfelagsábyrgd nevnd í annaðhvørt leiðslufrágreiðingini ella í einum skjali til leiðslufrágreiðingina, verður frágreiðingin fevnd av tí ummæli, sum grannskoðari skal gera av leiðslufrágreiðingini eftir § 135, stk. 5 í ársroknskaparlógini. Í sambandi við grannskoðanina av ársroknskapinum og einum møguligum samtaksroknskapi skal grannskoðarin ansa eftir, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við upplýsingarnar í ársroknskapinum og einum møguligum samtaksroknskapi. Grannskoðari skal ummæla hetta.

Í § 99 a, stk. 4, 2. pkt. verður skotið upp, at fyritøkurnar – heldur enn at taka frágreiðingina um samfelagsábyrgd við í leiðslufrágreiðingini – fáa møguleika fyri at velja ímillum tveir aðrar møguleikar at almannakunngera; annaðhvørt í eini ískoytisfrágreiðing til ársfrásøgnina ella á heimasíðu fyritøkunnar, har víst verður til leiðslufrágreiðingina.

Fyritøkur, sum gera eina sjálvstøðuga frágreiðing um arbeiðið við samfelagsábyrgd, ið lýkur krøvini til frágreiðingina, sbr. stk. 2, kunnu t.d. nýta hesa frágreiðing og tí annaðhvørt leggja hesa við sum ískoyti til ársfrásøgnina ella almannakunngera hana á heimasíðu felagsins við tilvísing í leiðslufrágreiðingini.

Einstaka fyritøkan ger sjálv av, hvussu almannakunngjørt verður. Á henda hátt verður tryggjaður størst møguligur fleksibilitetur fyri fyritøkurnar, sum kunnu nýta júst ta almannakunngering, sum hóskar best í mun til samskifti við interessentarnar.

Uttan mun til hvørja almannakunngering fyritøkan velur, hevur leiðslan ábyrgd av upplýsingunum og almannakunngeringini av hesum í samsvari við lógarkrøvini, sbr. §§ 8-10 í ársroknskaparlógini, sum eisini fevnir um upplýsingarnar eftir § 99 a, sum fyritøkan velur at lata í eini ískoytisfrágreiðing til ársfrásøgnina ella á heimasíðuni.

Um fyritøkan velur at nýta ein av teimum hættum at almannakunngera, sum eru nevndir sum aðrir møguleikar til leiðslufrágreiðingina, skal tað standa í leiðslufrágreiðingini, hvar henda frágreiðing er sett, og hvussu interessentarnir finna frágreiðingina, sum er tøk hjá almenningunum.

Er frágreiðingin almannakunngjørd á eini heimasíðu, sbr. nr. 2, skal vera eitt leinki til frágreiðingina, so tað er lætt hjá interessentunum at finna frágreiðingina um heimsíðuna hjá fyritøkuni.

Skotið verður upp í § 99 a, stk. 5, at heimild verður givin Skráseting Føroya at áseta nærri reglur um almannakunngering av frágreiðingini um samfelagsábyrgd í ávikavist eini ískoytisfrágreiðing og, við eini tilvísing í leiðslufrágreiðingini, á heimasíðu felagsins. Reglurnar fara m.a. at fevna um, hvussu upplýsingarnar á heimasíðuni verða dagførdar, og um skyldurnar hjá grannskoðaranum í sambandi við tær upplýsingar, sum verða almannakunngjørdar á heimsíðu fyritøkunnar, heruppií eisini, at ein grannskoðari skal eftirkanna, at frágreiðingin er tøk á heimasíðuni.

Ætlanin er hvørki at skerja ella víðka tær skyldur, sum grannskoðarin hevur í mun til innihaldið í upplýsingunum í leiðslufrágreiðingini, bert tí at upplýsingarnar eru settar aðra staðni enn í leiðslufrágreiðingini.

Í uppskotinum til § 99 a, stk. 6 - 8 verða skotnir upp nakrir lættar fyri fyritøkur, sum eru partur av einum samtaki.

Eftir § 99 a, stk. 6, kann fyritøkan sleppa undan at lata upplýsingarnar eftir stk. 1 og 2 í sínum egna roknskapi, um fyritøkan er ein móðurfyritøka, sum ger samtaksroknskap og í hesum lýkur krøvini fyri samtakið sum heild.

Fyritøkan kann eisini sleppa undan at lata upplýsingarnar, bæði fyri fyritøkuna og samtakið, um fyritøkan lýkur treytirnar í stk. 7 um at gera eina framburðarfrágreiðing í sambandi við, at fyritøkan hevur tikið undir ST Global Compact ella ST-meginreglunum um ábyrgdarfullar íløgur.

Eftir § 99 a, stk. 7 kann ein dótturfyritøka, sum er partur av einum samtaki, har móðurfyritøkan ger samtaksroknskap og í hesum lýkur upplýsingarkrøvini fyri samtakið sum heild, sleppa undan at taka upplýsingarnar við í sína egnu leiðslufrágreiðing. Talan kann bæði vera um evstu móðurfyritøkuna fyri samlaða samtakið, eins og talan kann vera um ta móðurfyritøkuna, sum er beint omanfyri.

Ein føroysk dótturfyritøka í einum útlendskum samtaki kann einans sleppa undan upplýsingarkravinum, um móðurfyritøkan letur hesar upplýsingar í einum almennum samtaksroknskapi. Um hetta ikki er støðan, skal dótturfyritøkan taka frágreiðingina um samfelasgábyrgd við í sína leiðslufrágreiðing í eini ískoytisfrágreiðing ella á heimasíðu fyritøkunnar.

Fyritøkan kann eisini sleppa undan at lata upplýsingarnar í síni egnu ársfrásøgn, um móðurfyritøkan lýkur treytirnar í stk. 8 um at gera eina framburðarfrágreiðing í sambandi við, at fyritøkan hevur tikið undir við ST Global Compact ella ST-meginreglunum um ábyrgdarfullar íløgur.

Undantøkini eru m.a. grundað á, at tað er ovasta móðurfyritøkan í einum samtaki, sum tekur undir við Global Compact vegna samlaða samtakið. Tað er sostatt vanlig manngongd í Global Compact, at samtakið greiðir frá vegna dótturfyritøkurnar.

Eftir uppskotinum galda linkaðu treytirnar í § 99 a, stk. 6 - 8 fyri bæði stórar fyritøkur í roknskaparflokki C og fyri fyritøkur í roknskaparflokki D.

Í uppskotinum til § 99 a, stk. 8, verður skotið upp, at fyritøkur, sum hava tikið undir við ST Global Compact ella ST-meginreglunum um ábyrgdarfullar íløgur, sleppa undan at gera eina frágreiðing um samfelagsábyrgd eftir hesum lógaruppskoti. Skotið verður sostatt upp, at fyritøkan kann sleppa undan at lata upplýsingar eftir stk. 1 og 2, um fyritøkan greiðir frá sum part av síni undirtøku fyri ST Global Compact ella ST-meginreglunum um ábyrgdarfullar íløgur.

Fyri at kunna brúka undantakið, skal fyritøkan hava almannakunngjørt eina framburðarfrágreiðing, sum er gjørd í sambandi við undirtøkuna, í viðkomandi ári. Framburðarfrágreiðingin skal vera í samsvari við viðmælini hjá ST um innihaldið í slíkum frágreiðingum.

Almannakunngjørda framburðarfrágreiðingin kemur í staðin fyri skylduna at lata upplýsingar eftir stk. 1 og 2 í uppskotinum. Kravt verður sostatt ikki, at fyritøkan skal greiða frá innihaldinum í frágreiðingini.

Í leiðslufrágreiðingini skal fyritøkan upplýsa, um hon nýtir hetta undantak. Harumframt skal fyritøkan týðiliga upplýsa, hvar framburðarfrágreiðingin er tøk hjá almenninginum. Í leiðslufrágreiðingini kann t.d. vísast til heimasíðuna hjá fyritøkuni, har eitt leinki er til almannakunngjørdu framburðarfrágreiðingina á heimasíðuni hjá Global Compact, so frágreiðingin er løtt at finna hjá teimum, ið hava áhuga fyri tí.

Sum nevnt í almennu viðmerkingunbum, kapittul 1. pkt. 2, fylgir uppskotið um innihaldið í frágreiðingini um samfelagsábyrgd, sum gongur fram av § 99 a, stk. 1-3, í uppskotinum, ST- tilmælunum um innihaldið í framburðarfrásagnum, sum limir av ST Global Compact skulu gera. Global Conpact (www.unglobalcompact.org) er heimisns stórsta sjálvbodna netverk fyri fyritøkur, sum arbeiða við samfelagsábyrgd.

Til nr. 6

Broytingin viðvíkur "Bilag 2, 1. skema for balance i kontoform (regnskabsklasse B, C og D), OMSÆTNINGSAKTIVER, II, Tilgodehavender, nr. 6: »Krav på indbetaling af virksomhedskapital".

Sum avleiðing av uppskotinum um broyting av § 35 b, sbr. § 3, nr. 2 í uppskotinum, viðvíkjandi presentatión av ikki inngoldnum yvirkursi og avsetan av tiltakspeningi til hetta, verður skotið upp, at skemaðið verður broytt samsvarandi hesum soleiðis, at nr. 6 eisini viðvíkur kravi upp á inngjald av yvirkursi.

Til nr. 7

Broytingin viðvíkur "Bilag 2, 1. skema for balance i kontoform (regnskabsklasse B, C og D), PASSIVER, EGENKAPITAL, IV, Andre reserver, nr. 4: »Reserve for ikke indbetalt virksomhedskapital".

Sum avleiðing av uppskotinum um broyting av § 35 b, sbr. § 3, nr. 2 í uppskotinum, viðvíkjandi presentatión av ikki inngoldnum yvirkursi og avsetan av tiltakspeningi til hetta, verður skotið upp, at skemaið verður broytt samsvarandi hesum soleiðis, at nr. 4 eisini viðvíkur kravi upp á inngjald av yvirkursi.

Til nr. 8

Broytingin viðvíkur "Bilag 2, 1. skema for balance i kontoform (regnskabsklasse B, C og D), PASSIVER, EGENKAPITAL, IV, Andre reserver".

Uppskotið er ein avleiðing av uppskotinum um íverksetarafeløg.

Skotið verður upp, at tað verður serligur tiltakspeningur fyri íverksetarafeløg til avsetan av møguligum yvirskoti, sbr. § 3, nr. 3 í uppskotinum.

Til nr. 9

Broytingin viðvíkur „Bilag 2, 2. skema for balance i beretningsform (regnskabsklasse B, C og D), OMSÆTNINGSAKTIVER, II, Tilgodehavender, nr. 6: »Krav på indbetaling af virksomhedskapital“.

Sum avleiðing av uppskotinum um broyting av § 35b, sbr. § 3, nr. 2 í uppskotinum, viðvíkjandi presentatión av ikki inngoldnum yvirkursi og avsetan av tiltakspeningi til hetta, verður skotið upp, at skemaið verður broytt samsvarandi hesum soleiðis, at nr. 6 eisini viðvíkur kravi upp á inngjald av yvirkursi.

Til nr. 10

Broytingin viðvíkur “Bilag 2, 1. skema for balance i beretningsform (regnskabsklasse B, C og D), EGENKAPITAL, IV, Andre reserver, nr. 4: »Reserve for ikke indbetalt virksomhedskapital“.

Sum avleiðing av uppskotinum um broyting av § 35 b, sbr. § 3, nr. 2 í uppskotinum, viðvíkjandi presentatión av ikki inngoldnum yvirkursi og avsetan av tiltakspeningi til hetta, verður skotið upp, at skemaið verður broytt samsvarandi hesum soleiðis, at nr. 4 eisini viðvíkur kravi upp á inngjald av yvirkursi.

Til nr. 11

Ásetingin viðvíkur “Bilag 2, 3. skema fyri javna í “beretningsform (regnskabsklasse B, C og D), EGENKAPITAL, IV, Andre reserver.“

Uppskotið til nýtt pkt. 5 i skemanum er ein avleiðing av uppskotinum til broyting í vinnufelagslógini um íverksetarafeløg.

Skotið verður upp, at tað er ein serligur reservi fyri íverksetarafeløg til avsetingar av møguligum yvirskoti, sbr. § 1, nr. 4, í uppskotinum.

Til § 2

Ásett er, at lógin kemur í gildi 1. januar 2017.

Poul Michelsen

landsstýrismaður

/Pól Edvard Egholm

Fylgiskjøl
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringssvar frá Fíggjarmálaráðnum
Fylgiskjal 3: Hoyringssvar frá Felagnum Føroyskir Grannskoðarar
Fylgiskjal 4: Hoyringssvar frá Føroya Arbeiðsgevarafelag